# Grønland umhugsar IWC

Sleppa grønlendingar ikki at veiða 10 kúlubøkur um árið, fer landið at taka seg burtur úr Altjóða Hvalaveiðinevndini IWC. Ane Hansen, landsstýrismaður í veiðimálum, sigur við KNR, at landsstýrið er í ferð við at kanna, um NAMMCO kann fáa størri avgerðarrætt, so felagsskapurin eisini kann loyva londum at veiða stórhval. Tað kann NAMMCO ikki sum er, men bæði Noreg og Kanada hava tikið undir við at geva felagsskapinum ta heimildina. Tí fer Ane Hansen at venda sær til tey bæði londini um málið, sigur KNR.



# Vinnutól seld av landinum

Tá kreppan í Íslandi tók seg upp í 2008, fekk hon beinan vegin stóra ávirkan á byggivinnuna, og gongdin var tann sama í fjør. Tað hevur millum annað havt við sær, at ein rúgva av vinnutólum eru farin av landinum hesi bæði árini. Ein kanning hjá ídnaðarfelagnum vísir, at í 2008 fóru 1.368 vinnutól úr Íslandi, og at talið kom heilt upp í 2.248 í fjør. Ídnaðarfelagið sigur, at heldur hendan gongdin fram, verða eingi vinnutól eftir í landinum, tá búskaparstøðan fer at batna aftur. Felagið vil tí hava myndugleikarnar til at seta fleiri arbeiði í gongd.

# Brynja seg til útlendska marknaðin

**Føroya Banki boðar í morgun frá, at teir ætla at leggja eitt uppskot um navnabroyting fyri aðalfundin, sum verður lættari hjá útlendsku kundunum at fáast við**

NAVNABROYTING

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Meira enn 100 ára gamla Føroya Banka navnið fer nú í søguna.

Leiðslan í bankanum fer á aðalfundinum at skjóta upp, at bankin skiftir navn frá Føroya Banka til BankNordik – stavað við norðurlendskari stavseting.

- Tað hevur víst seg, at vit hava rent okkum inn í eitt sindur av einum trupulleika við Føroya Banka navninum uttanlands. Kundar okkara í hinum norðanlondunum hava ein ávísan trupulleika at sameina seg við navnið, og tí hava vit gjørt av at skjóta upp fyri aðalfundinum, at vit broyta navið til BankNordik – ella bara Nordik í dagligari talu, sigur Janus Petersen, forstjóri í Føroya Banka.

Frá at hava verið ein føroyskur peningastovnur við eini meiri enn 100 ára gamlari søgu hevur bankin nú samsvarandi altjóða strategi bankans ment seg til at vera ein norðurlendskur figgingarstovnur. Í februar mánaði keypti bankin 12 deildir í Danmark og Grønlandi frá danska Sparbank, og í fjør keypti bankin eitt íslendskt tryggingarfelag. Sostatt er ein týðandi partur av samlaða virksemi bankans nú uttan fyri Føroyar.

Í tíðindaskrivi sigur bankin, at deild bankans í Keypmannahavn hevur seinastu árini virkað undir navninum Føroya Bank. Royndir og kanningar hava víst, at fleiri av viðskiftafólkunum hava kent seg fremmand við hetta navn. Viðskiftafólkini og starvsfólkini í nýkeyptu deildunum í Danmark og Grønlandi hava tikið sera væl ímóti nýggja eigaranum, men eisini her hevur ein ávís óvissa verið staðfest viðvíkjandi verandi navni bankans.

## Altjóðagerð

Økta virksemi bankans uttanlands er beinleiðis orsøkin til, at avgerð nú er tikin í leiðsluni at broyta navnið til BankNordik.

- Frá at hava verið ein føroyskur banki burturav, eru nú 55.000 av kundum bankans uttan fyri Føroyar, meðan vit hava 25.000 kundar her heima. Tað er fyrst og fremst fyri útlendsku kundarnar skuld, at vit nú skjóta upp at broyta navnið á bankanum til BankNordik, sigur Janus Petersen.

Hann viðgongur, at tað kann liggja ein ávísur vandi í at strika Føroya Banka navnið, og tað var eisini uppi av venda, at varðveita gamla navnið í Føroyum.

- Tað er ein vandi í, at føroyingar fara at hava ilt við at venja seg við nýggja navnið, men tað varð hildið at verða ov tvørligt at bankin hevði fleiri nøvn. So vónandi fara eisini føroyingar skjótt at venja seg við BankNordik, sigur Janus Petersen.

Hann vísir á, at sermerki bankans og vælvirkandi grafiski samleikin verða ikki broytt.

At seta navnabroytingina í verk krevur eina broyting av viðtøkum bankans. Uppskot nevndarinnar um navnabroyting verður tískil lagt fram á ársaðalfundi bankans til støðutakan. Ársaðalfundur bankans verður mánadagin tann 29. mars 2010 á Hotel Føroyum.

Neyðugt er sjálvandi, at aðalfundurin góðkennir eina navnabroyting, men tað er neyvan orsøk at halda, at fundurin fer at ganga ímóti tilmælinum frá nevndini.




*Gongst sum nevndin ætlar, verður Føroya Banka navnið skjótt »en saga blot«*




AÐALSTJÓRI TIL UTTANRÍKISRÁÐIÐ

Aðalstjórin verður ovasti ráðgevi hjá landsstýrismanninum í uttanríkismálum og fer at hava ábyrgdina av dagligu leiðsluni, menningini og rakstrinum av Uttanríkisráðnum. Aðalstjórin er ovasti leiðari fyri føroysku Uttanríkistænastuna.

Økið fevnir um altjóða politisku og altjóða rættarligu viðurskifti Føroya, luttøku í millumtjóða og altjóða felagsskapum, handilspolitisku viðurskifti við onnur lond, menningarhjálp, útflutningsframa og ferðavinnu og at menna umdømi Føroya í altjóða høpi.

**Høvuðsuppgávur:**
· Leiða og samskipa arbeiðið í ráðnum
· Samskipa og fyrireika uppgávur í omanfyri nevndu málum
· Fyrireika lógir, kunngerðir og reglugerðir innan virkisøkið
· Ábyrgd av samráðingum við onnur lond og altjóða felagsskapir innan virkisøkið
· Aðrar viðkomandi uppgávur, sum hoyra virkisøkinum til

**Førleikakrøv**
Kravt verður, at umsøkjarin hevur útbúgving á master stigi frá lærdum háskúla og leiðsluroyndir frá almenna ella privata arbeiðsmarknaðinum. Somuleiðis verður kravt, at umsøkjarin hevur góðan málsligan førleika og hollan kunnleika til føroyskt, enskt, danskt og norðurlendskt mál.

Viðgerðin av umsóknum tekur støði í leiðsluprofilinum hjá Uttanríkisráðnum, sum sæst á heimasíðuni hjá Løgmansskrivstovuni (www.tinganes.fo).

**Setanarviðurskifti**
Starvið er tænastumannastarv, starvsheitið er aðalstjóri og er flokkað í 39. lønarflokki. Harumframt er ein mánaðarlig viðbót uppá 4.906,02 kr. Viðbótin er ikki eftirlønargevandi. Setanarøkið fevnir um Uttanríkisráðið, stovnar undir tí, Løgmansskrivstovuna og hini stjórnarráðini. Tænastustaðurin er í løtuni Uttanríkisráðið. Tann, ið settur verður í starvið, skal tola at verða fluttur í onnur leiðandi størv í Uttanríkisráðnum.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Marjuna Hanusardóttir, løgmansstjóra, tlf. 55 10 30.

Umsóknir við upplýsingum um útbúgving, royndir og møgulig viðmæli skulu stílast til løgmann og sendast Løgmansskrivstovuni, Marjuni Hanusardóttir, løgmansstjóra, postsmoga 64, 110 Tórshavn, í seinasta lagi hósdagin 18. mars kl. 12. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Uttanríkisráðið er eitt av stjórnarráðunum í landsfyrisitingini, sum veitir landsstýrinum ráð, tryggjar haldgott grundarlag og ger hugskot til veruleika. Landsfyrisitingin er fremst í nýskapan, arbeiðslagi og samskifti. Landsstýrismaðurin í uttanríkisráðnum situr fyri altjóða politisku og altjóða rættarligu viðurskiftum Føroya, luttøku í millumtjóða og altjóða felagsskapum, handilspolitisku viðurskiftum við onnur lond, ferðavinnu, útflutningsframa og menningarhjálp og at menna umdømi Føroya í altjóða høpi.

VIT DRAGA EINA LÍNU · VIT SETA SKYNSEMI Í HÁSÆTI · VIT VILJA VITA · VIT BRÓTA SLÓÐ

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office